ÍTRÓTTARÁRIÐ

Apríl:

15 ára gamal føroyingur til Arsenal

Ingi Højsted gerst fyrsti føroyingurin í enskum fótbólti, tá stórfelagið, Arsenal, ger sáttmála við 15-ára gamla B36-leikaran

15 ára gamli Ingi Højsted skrivar sáttmála við Arsenal, og gerst sostatt fyrsti føroyingurin í enskum fótbólti

3. apríl
Todi Jónsson sigur nú, at hann umhugsar framtíðina á føroyska landsliðnum. Tað er óttin fyri skaðum, nú endaspurturin um DM-heitið fer í gongd, sum er stórsta orsøkin.

FCK vinnur hetta vikuskifitð á Brøndby, og nærkast alsamt oddinum, meðan Herfølge endiliga fær stig, tá teir fáa málleysan javnleik ímóti AB.

Manager'in í Hvidovre, Jan Sørensen, heldur, at Óli Johannesen telist millum mest undirmettu leikararnar í Danmark.

Petur Niclansen og Maria Petersen eru føroyameistarar í borðtennis.

Kyndilsmenn missa silvurmøguleikan, tá teir á heimavølli tapa tepurt fyri VÍF.

4. apríl
Uni Arge er á veg heim aftur til føroyskan fótbólt. Fíggjarstøðan hjá íslendska ÍA er ikki nóg góð til at álopsmaðurin kann fáa nøktandi sáttmálaviðurskifti.

Rógvi Johansen hevur gjørt av, at hann framvegis skal súkkla fyri Cycling Aarhus, hóast onnur feløg hava sýnt áhuga fyri vágbinginum.

Lassin Isaksen skal døma Alandsdystin í fótbólti millum Liktenstein og Ísrael.

5. apríl
ÍSB hevur fyri fyrstu ferð skipað fyri borðtenniskapping, og eru tá Jógvan Jákup Høj, Unn Mortensen og Jónsvein Petersen, sum vinna í ymsu bólkunum.

Bridge kappingin er nú av, og sum væntað gjørdist liðið hjá Allan Dal-Christiansen føroyameistari.

6. apríl
FM-kappingin fyri einstaklingar í talvi verður í Vestmanna um vikuskiftið, og hóast verandi meistarin, Flóvin Tór Næs, ikki er við, tykist kappingin at verða hin sterkasta nakrantíð.

Í Vestmanna gera tey klárt til gullveitslu, nú hondbóltskappingin fer at enda, og bæði kvinnur og menn skulu krúnast sum meistarar.

10. apríl
Ivamál hevur tikið seg upp um, hvørt Tjaldur ella Sóljan skulu flyta niður. Liðini eru jøvn í stigum, men tá Tjaldur ikki møtti til ein dyst í grundspælinum, eiga tær niður, hóast tær hava betri málmun, men í Runavík siga tey, at tey ongan tíð fingu boð um, at tey fóru at tapa viðkomandi dystin á pappírinum.

VÍF fær endiliga gullmerkini, nú hondbóltskappingin er endað, og so skjótt sum dystirnir sunnudagin eru av, verða borð við mati til bæði leikarar og viðhaldsfólk sett fram.

Í Danmark gongst væl hjá FCK, og at hini bæði oddaliðini, Silkeborg og Brøndby, spæla javnt, ger sjávlandi ikki støðuna verri. Í botninum er Herfølge farið at bíta frá sær.

Atli Gregersen spælir fyri fyrstu ferð á besta liðnum hjá Randers Freja. Hetta er í næstbestu donsku deildini.

Ingi Højsted verður helst fyrsti føroyingurin í enskum fótbólti. Eftir øllum at døma vil stórfelagið, Arsenal, gera sáttmála við unga B36-leikaran.

11. apríl
So er sáttmálin hjá Inga Højsted veruleiki. Á tíðindafundi almannakunngerð B36, at felagið hevur latið Arsenal spæliloyvið hjá Inga.

B68 hevur gjørt avtalu um, at Mortan Hansen er komin til felagið úr barndómsfelagnum, NSÍ. Eisini KÍ fær nýggjan áleypara. Talan er um fyrrverandi jugoslaviska landsliðsleikaran, Alexander Djordjevic.

12. apríl
Í Vágunum eru tey í øðini um, at Tjaldur ikki vil flyta niður. Tey siga reglurnar vera púrasta greiðar, og at HSF ikki kann taka aðra støðu, enn at flyta Tjaldur niður.

Fótbóltskvinnurnar úr Klaksvík boðað frá, at tær ætla at vera við, nú UEFA eisini fer at skipa fyri Europa-Cup kapping í kvinnufótbólti.

Flogbóltsgalla er í Havn, har millum annað ársins leikarar verða funnir. Marina Popovic úr Drátti og Boban Ilic úr ÍF verða kosin sum tey bestu hetta kappingarárið.

18. apríl
HSF riggar til aðalfundin, og líkt er til, at fleiri spennandi mál eru á skránni. Millum annað tal av liðum í bestu deildunum, tal av útlendingum og greiðar reglur fyri, hvussu leikarar kunnu skifta millum feløg.

John Rødgaard gerst føroyameistari í talvi fyri einstaklingar. Eyðun Nolsøe verður næstbestur.

Hondbólturin hevur sítt gallakvøld í Vestmanna. Hjá kvinnum verðru Sóley Mikkelsen ársins leikari, meðan Ingi Olsen verður kosin hjá monnum. Bæði spæla tey við VÍF.

FCK er nú bert eitt stig frá oddasessinum í dansku superliguni. Herfølge fór ósigrað gjøgnum páskirnar, men onnur úrslit gjørdu, at teir kortini dragnaðu í botnstríðnum.

Max Rasmussen gerst føroyameistari í billard. Eisini fyri pør er Max føæroyameistari. Her saman við Eyðun Svalbard.

19. apríl
U-20 landsliðið í kvinnuhondbólti tapir allar dysitrnar, men úrslitini vóru kortini góð í EM-undankappingini, sum varð hildin í Týsklandi.

Grand-Prix kappingin í badminton er av, og gjørdust tað Guri Poulsen og Erland Poulsen úr HBF, sum vunnu kappingina fyri einstaklingar.

21. apríl
Drigið er um fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið. Dystirnir eru, HB-VB, B68-B36, KÍ-ÍF og NSÍ-GÍ.

Todi Jónsson er nú um at koma fyri seg aftur, eftir skaðan hann fekk, tá Føroyar spældu móti Luksemburg.

Flogbóltssambandið hevur aðalfund, og millum uppskotini er ein umskipan av kappingini hjá yngru deildunum.

24. apríl
Deildirnar verða ikki víðkaðar og tríggir útlendskir leikarar verða framvegis markið. Hetta eru millum annað niðurstøðurnar hja aðalfundinum hjá HSF.

B36, NSÍ, KÍ og HB eru liðini í hálvfinaluni í steypakappingini. Ikki minst er HB sannførandi, tá teir vinda burtur úr føroyameistarunum úr VB.

Thriathlon verður fyri fyrstu ferð á skránni til Oyggjaleikirnar, og í Føroyum verður nú skipað fyri úttøkukapping.

25. apríl
Jakup Mikkelsen og Todi Jónsson eru báðir á einum fiktivum liði, sum Michael Laudrup hevur tikið út fyri Ekstra-Bladet. Leikararnir á liðnum eru allir útlendskir leikarar í donskum fótbólti.

26. apríl
Alexander Djordjevic er nú komin til Klaksvíkar, har hann ætlandi skal styrkja um álopspartin, sum enn ikki er komin fyri seg eftir at Kurt Mørkøre varð seldur til Noregs.

Júst Kurt Mørkøre tykist nú verða skumpaðu enn longur út á beinkin í Sogndal. Felagið sigst hava áhuga í at keypa Håvard Flo.

27. apríl
Kvinnurnar fara undir fótbóltskappinga, og meistararnir úr KÍ fáa eina flúgvandi byrjan, tá tær vinna stórsigur á B36.

Róland Waag Dam vinnur silvur í altjóða judokapping.

Dart-árið endar við FM-kapping, og fyri einstaklingar gerst Alvin Egholm.

28. april
So verður farið undir fótbóltslandskappingina. Fyrsta umfarið er á skránni um vikuskiftið.

ÍTRÓTTARÁRIÐ

Mei:

Todi vendi landinum bakið

- Eg havi havt sera ilt við at taka avgerðina. Hjartað hevur verið fyri at spæla við Føroyum, men skilið hevur mær, at akkurát nú átti eg at givið avboð, segði Todi Jónsson millum annað eftir avboðið til landsliðið

1. mei
Ætlaði fótbóltslandsdysturin millum Føroyar og Noreg tykist hanga í klønum tráð.

FSF økir um umsitingina, og fyrsta dagin skal nýtt starv setast.

Í fótbóltslandskappingini tykist HB hava fingið bestu byrjanina, tá teir vinna sannførandi móti B68 á heimavølli. VB, GÍ og B71 vinna eisini sínar dystir.

FCK er enn betri fyri í oddinum og Herfølge er verri fyri í botninum eftir enn eitt umfar í donsku superliguni.

Í Noreg gongur tungt hjá teimum báðum føroysku leikarunum, og báðir verða teir skiftir út, tá Sogndal tapir 4-1 fyri Lillestrøm.

2. mei
Frúgvin úr Sandavági og Argjabáturin fara til Scilly-oyggjarnar, har HM-kappingin í gig-róðri er á skránni.

3. mei
FM í badminton hevur verið, og gerast Ingun Hansen og Erland Poulsen best hjá kvinnum og monnum.

Tryggingarfelagið Føroyar ger nýggjan sáttmála sum høvuðsstuðul hjá NSÍ.

4. mei
Julian Johnsson er skaddur, men hóast talan er um líknandi skaða, sum fyrr í ár, so er talan ikki um beinbrot.

Sponsorsáttmálarnir hjá HB við ávíkavist, Føroya Banka, Shell, Eimskip og Thomas Dam ítrótt verða undirskrivaðir.

5. mei
Millum dystirnar hetta vikuskiftið er klassikarin millum KÍ og HB.

6. mei
Kvinnurnar á Frúnni vunnu B-bólkin í gig-róðrinum, meðan Argjabáturin gjørdist nummar 62.

VB, HB og GÍ hava framvegis fult stigatal eftir tvey umfør. Størstu vónbrotini eru KÍ og B68, sum enn eru stigaleyst. Í 2. deild hevur Skála lagt bragdliga fyri, og hava teir sum einasta lið fult stigatal.

FCK er nú nummar tvey í superliguni. Bert eitt stig aftan fyri Brøndby. Herfølge er eftir vikuskiftið fýra stig frá at vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna.

7. mei
KÍ-kvinnurnar tykjast fullkomuliga einaráðandi í bestu kvinnudeildini, tá tær vinda burtur úr HB.

8., mei
Dómsnevndin hjá HSF skal taka støðu til spurningin um niðurflyting úr bestu kvinnudeildini, sostatt stutt tjóður í oddaliðnum úr Brøndby.

16. mei
Ståle Solbakken, sum herfyri hevur havt hjartatilburð, boðar frá, at hann gevst við fótbóltinum.

17. mei
Sophus Dal-Christiansen verður settur sum venjari hjá neistaeftir at Tjaldur hevur kært dómin hjá kappingarnevndini.

9. mei
Oddadystur er á skránni í Havn, har GÍ kemur á vitjan hjá HB.

15. mei
FM í svimjing hevur verið um vikuskiftið, og nýggi landsliðsvenjarin, Petur Heðin av Fløttu, er alt annað enn nøgdur um tað, sum hann hevur sæð. Breiddin í oddinum er ov lítil, heldur hann.

HB, sum annars hevur verið flúgvandi, er fyri røttum bakkasti. Fyrst tapa teir á heimavølli fyri GÍ, sum nú er einsamalt oddalið, og síðani tapa teir 3-1 fyri B36 í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini. Eisini meistararnir úr VB fáa ein hvøkk, tá teir á heimavølli mugu lúta fyri KÍ.

Í hinari hálvfinaluni spæla KÍ og NSÍ javnleik í Klaksvík.

Kvinnulandsliðið í flogbólti er úttikið, og nú verður farið undir venjingarnar til Oyl, har gullið skal verjast.

FCK vinnur føroyingauppgerðina móti Herfølge, og halda kvinnunum til komandi hondbóltsárið.

Fótbóltslandsliðið hevur hópin av skaðum at dragast við. Einir seks av vanliga føstu monnunum hava skaða og tykjast ivasamir til komandi uppgávurnar.

18. mei
Oddadysturin hetta vikuskiftið er í Gøtu, har B36 kemur á vitjan hjá GÍ,ið sum einasta lið hevur fult stigatal.

22. mei
Herfølge tapti um vikuskiftið, og nú niðurflytingin tykist veruleiknær, tykist tíðarskeiðið hjá Jákupi Mikkelsen í felagnum samstundis at vera runnið.

Jónleif Sólsker hevur gjørt avtalu við Kyndil um, at hann komandi árið skal venja mansliðið hjá felagnum.

Gøtumenn vinna fjórða dystin á rað, tá teir á heimavølli basa B36, og eftir fýra umfør eru teir nú trý stig undan næsta liðnum, sum er HB. Í aðru deild er Skála framvegis á odda, tó at bert eitt stig er niður til fimta plássið.

23. mei
Brøndby tapir óvæntað fyri Lyngby á heimavølli, og nú er FCK oddaliðið í dansku superliguni.

24. mei
Todi valdi við høvdinum og gloymdi hjartað. Soleiðis eru boðini, nú Todi Jónsson hevur boðað frá, at hann ikki verður tøkur hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, tað sum eftir er av hesari undankappingini.

Kurt Mørkøre er leysur av Sogndal. Norska felagið hevur ikki brúk fyri klaksvíkinginum, nú teir hava keypt Håvard Flo.

Helgi L. Petersen er nýggjur á landsliðnum, nú Allan Simonsen hevur tikið út hópin til dystirnar móti Sveis og Jugoslavia.

Virgar Hvidbro verður settur sum varaskrivari hjá FSF.

26. mei
Pól Thorsteinsson trætast við FSF um bonuspengar fyri sigurin í Luksemburg, og úrslitið er, at hann gevur avboð til dystirnar móti Jugoslavia og Sveis. Fyri Pól Thorsteinsson verður Jón Rói Jacobsen úttikin.

KÍ og B36 skulu spæla steypafinalu á ólavsøku. KÍ sleppur víðari eftir tveir javnleikir móti NSÍ, meðan B36 kemur í finaluni, hóast teir tapa seinnu hálvfinaluna móti HB.

29. mei
Tað má vera lagnunnar speisemi, men fáar dagar eftir, at Todi Jónsson hevur givið avboð til landsliðið - av ótta fyri skaðum – verður hann skaddur, tá FCK spælir javnleik móti Lyngby.

Í føroysku fótbóltskappingini vinnur GÍ fimta dystin á rað, tá teir basa meistarunum úr Vági, meðan B36 setir met í bestu deildini við at vinna 15-0 á FS Vágum. HB missir takið í oddinum, tá teir tapa fyri NSÍ í Runavík.

Andrass Weihe úr Sørvági gerst hepni vinnarin av eini fótbóltsferð. Kappingin var partur av fótbóltsblaðnum, sum Sosialurin gav út í mars mánaði.

30. mei
Henrik Berthelsen, landsliðsvenjari í fimleiki, sigur, at karmarnir hjá føroyskum fimleikarum eru alty ov vánaligir til, at íðkararnir framhaldandi kunnu mennast.

31. mei
Teir báðir vandamestu álopsmenninir hjá Sveis, Stéphane Chaupisat og Kubilay Türkiylmaz eru ikki við á liðnum, sum nú kemur til Føroya.

Talvsambandið boðar frá, at talvkongurin, Gary Kasparov, verður í Føroyum í døgunum, 8.-12. juni.

Hjartað segði Føroyar – skilið nakað annað. Soleiðis ljóðaði yvirskriftin, tá Sosialurin kom á gøtuna mikukvøldið, 23. mei